

*Børnini í útibarnagarðinum Fjallafípan í Klaksvík gleða seg til norðoyastevnu. Serliga dámar teimum rutsjibanan*

# Rutsjibanin hittar

**Í útibarnagarðinum Fjallafípuni úti í Grøv í Klaksvík er tað rutsjibanin, sum er tann stóri vinnarin á norðoyastevnu. – Rutsjibanin er nógv tað stuttligasta. Man fer bara niðan gjøgnum trappur, gongur yvir, og so rutsjar man niður, sigur seks ára gamli Símun, sum fleiri ferðir fyrr hevur verið á norðoyastevnu**







Í STEVNUHÝRI
*Ingrid Bjarnastein*

Norðoyastevnan stendur fyri durum, og í útibarnagarðinum í Grøv eru tey sera spent til at sleppa á stevnu. Tað, sum vísir seg at vera afturvendandi í prátinum hjá teimum, er rutsjibanin, sum er nógv tað stuttligasta.

– Á norðoyastevnu plagi eg at spæla. Eg fari í tivoli, og har plagi eg at fiska í fiskibrunninum. Rutsjibanin er stuttligast. Man fer bara niðan ígjøgnum trappurnar, gongur yvir, og so rutsjar man niður, sigur seks ára gamli Símun, sum er ein av teimum, sum gongur í Fjallafípuni.

Við borðið sita nøkur børn. Tey eru øll um seks ára aldur, og tað sæst á gólvinum, at í dag hava tey klipt og límað í langar banar.

Maria er sjey ár.

– Eg veit ikki, hvat eg plagi at gera, sigur Maria, men tá vit spyrja eitt sindur, kemur meira burturúr henni.

– Fiska í fiskidamminum. Eg plagi eisini at fara til kappróður, og í rutsjibanan.

## Føroysk klæði

Onkur eigur føroysk klæði av teimum, sum vit práta við.

– Eg eigi bara føroyska húgvu, men eg haldi, at hon er for lítil, sigur Símun.

Irena er seks ár, og hon eigur føroysk klæðir.

– Á norðoyastevnu fari eg í føroysk klæðir. Systkini hjá mær, sum eita Julia og Regin, tey eiga ongi føroysk klæðir, sigur Irena.

– Eg plagi ikki at hyggja eftir fótbólti, og heldur ikki eftir kappróðri. Men eg haldi við Manchester og KÍ, sigur Símun, sum heldur, at hoppiborgin er onki stuttlig.

Men sleppa tit at vera longur uppi tá tað er norðoyastevna?

– Ja, eg sleppi at vera longur uppi. Okkurt um ein hálvan tíma, haldi eg, fortelur Símum væl nøgdur. Hann er tann mest prátingarsami. Diddurnar rundanum borðið eru eitt sindur smædnar.

Vit fara so innar í Nýggjustovu. Har eru børnini eitt sindur yngri, og tey sita og hyggja eftir teknifilmi. Veðrið er eitt sindur illfýsið í dag. Nógv regn, og tey hava verið úti allan fyrrapartin, so meginparturin av teimum hevur fingið karm, so nú er tað ordiliga deiligt, at sita inni og hvíla seg eina løtu.

– Eg havi ongantíð verið á norðoyastevnu fyrr, so tað er ordiliga spennandi, sigur Karsten, sum er fýra ár.

Gudny er eisini fýra ár.

– Eg plagi at vera í føroyskum klæðum á norðoyastevnu. Eg eigi ongi føroysk klæðir, men Rósa, sum er systkinabarnið hjá mær eigur, so eg plagi at læna tey frá henni. Vit plaga at fara í tivoli, og síggja rakettir bresta í luftini, fortelur Gudny væl nøgd.

– Eg ætli mær eisini á norðoyastevnu. Eg havi eisini verið fyrr. Eg ætli mær at spæla, og í tivoli og eisini til kappróður, sigur Andrias, sum yppir øksl, tá vit spyrja um hann ætlar sær at hyggja eftir KÍ.

Tað er eitt sindur ringt at tosa, tí øll vilja fortelja, og tí rópa øll ísenn. Men nú kemur millummálin á borðið. Poppkorn fáa tey í dag, men fyrst fara vit út at taka eina mynd. Børnini renna úr stovuni og uttar í gongina at lata seg í. Onkur má fara í vátan jakka, tí tað regnaði so illa fyrr í morgun. Myndin er skjótt fingin til vega, og vit takka fyri okkum.





*- Tað sum hevur størstan týdning er at vera saman við øðrum til stevnurnar, og tað er tað sum dregur. Alt hitt er bonus. Sjálvandi fer man eisini til tiltøk, men lyklaorðið er at vera saman við øðrum, sigur Jógvan Ravnsfjall, leiðari á Norðoya Fornminnasavni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Norðoyastevna:

# Okkara stevna

**Norðoyastevna var fyri fyrstu ferð í 1936, og síðani tá er hon nógv broytt. Sum samfelagið er broytt, er norðoyastevnan eisini broytt við tíðini. - Samferðslukervið var ikki útbygt á sama hátt, sum tað er nú. Fyrr komu fólk á norðoyastevnu og gistu her. Nú ber tað til at koma bara til eitt serligt tiltak, og so fara heimaftur, greiðir Jógvan Ravnsfjall, leiðari á Norðoya Fornminnasavni frá í samrøðu**

Í STEVNUHÝRI
*Ingrid Bjarnastein*

Síðani Norðoyastevnan var á fyrsta sinni í 1936 , hevur Jógvan Ravnsfjall, leiðari á Norðoya Fornminnasavni verið til tær seinastu 29.

- Norðoyastevnan er nógv broytt síðani tað fyrstu. Samfelagið er eisini broytt, og stevnan er broytt við samfelagnum. Samferðslukervið var ikki so væl útbygt, sum tað er í dag. Fyrr komu fólk á norðoyastevnu, og gistu, men nú samferðslan er so góð, so nú ber til at koma til eitt tiltak, og so fara heimaftur, sigur Jógvan Ravnsfjall.

Fyrr var norðoyastevnan ein ítróttar- og mentanarstevna, og tað vóru nógv eldri fólk, sum komu at halda norðoyastevnu, og tað var ein norðoyastevnunevnd, sum legði stevnuna til rættis. Nú eru nógv fleiri ung fólk, og tað er NFÍ, Norðoya Frítíðar og Ítróttarráð, sum stendur aftan fyri stevnuna, samskipar hana og ger endaligu stevnuskránna.

## Pengastevna

Tá norðoyastevnan fyrstu ferð varð hildin, var hon onnur stevnan í røðini. Áðrenn var bara jóansøkan, sum varð hildin sum stevna í Føroyum, um vit ikki rokna ólavsøkuna uppí.

- Ólavsøka, sum kristin høgtíð, hevur verið síðani einaferð í miðøldin. Jóansøkan kom so í 1924. Aftaná norðoyastevnan kom í 1936, komu hinar størru stevnurnar aftaná, Vágastevnan, seinni Vestanstevnan, Skálafjarðastevnan, Varmakeldustevnan og so víðari. Í dag er tað næstan hvør stór bygd, sum hevur sína stevnu, og tí er norðoyastevnan bara ein av øllum hinum stevnunum, greiðir Jógvan frá.

Tá stevnurnar vóru hildnar fyrr, so vóru ikki nógv onnur tiltøk kring landið. Nú er okkurt tiltak í teimum stóru bygdunum og býunum so at siga hvørt vikuskiftið.

- Á norðoyastevnu vóru so nógv tiltøk, sum annars kundu verið hildin ígjøgnum alt árið savnað á sjálvari stevnuni. Norðoyastevnan er vorðin til ein sið, og um ongin norðoyastevna hevði verið í ár, so hevði tað verið heilt undarligt, heldur fornminnaleiðarin.

Norðoyastevna var fyrr bara leygardag og sunnudag. Nú er skráin vaksin nógv á øllum stevnunum, og tað sæst eisini aftur í norðoyastevnuskránni. Skráin byrjar ofta mikudag, og er ikki liðug fyrr enn týsdag ella mikudag aftaná sjálva stevnuna.

- Um skráin verður ov long, so missir stevnan sín týdning, so eg vænti ikki, at skráirnar fara at leingjast meira við tíðini.

- Stevnurnar eru eisini vorðnar til pengastevnur burturav, har tað snýr seg nógv meira um at forvinna pening enn mentan, sum tað var fyrr. Tá tú uppdagar hetta, so sær tú beinanvegin, at tú fært ikki tað burturúr, sum tú ætlaði. Tað kann blíva til ov nógv av eini pengastevnu, og foreldur uppdaga tað beinanvegin, tá tey skulu brúka fleiri 100 krónur til børnini. Tað bilar onki, um tey sum skipa fyri ansa eftir hesi felluni við pengunum, sigur Jógvan Ravnsfjall.

## Sosialan týdning

Stevnuarnar hava, sum vera man, eisini ógvuliga stóran sosialan týdning. Ítróttin hevur nógv tiltøk, og á skránni er altíð kapप्रóður, fótbóltur, og nú seinnu árini renning og súkkling.

- Fyri nøkrum ártíggjum síðani var tað soleiðis, at tá ungdómurin kom á stevnu, so gistu tey hjá vinum, kenningum ella familju. Gingið varð til tiltøk, og síðani endaði man kanska í einum dansi ella okkurt líknandi, og fór síðani heim dagin eftir. Hetta var kanska einasta ferðin á árinum, sum man sá familjuna, greiðir Jógvan frá, sum leggur afturat, at nú samferðslan er betri, so kemur tað meira enn so fyri, at fólk als ikki síggja familjuna á norðoyastevnu.

Norðoyastevnan hevur nógv at siga fyri norðoyingar.

- Tað er nakað man roknar við. Tú sært nógvar norðoyingar á norðoyastevnu, eisini teir á útoyggj. Á ein hátt er hetta ein stoltleiki. Hetta er okkara stevna.

Norðoyingar fyrireika seg eisini til stevnuna. Ikki bara ítróttarfeløg, og tey, sum skulu skipa fyri tiltøkum, men eisini øll onnur. Kommunan ruddar í býnum, og pyntar, og eisini heima verður ruddað og vaskað og gjørt klárt at taka ímóti gestum.

- Vanlig fólk fyrireika seg eisini til norðoyastevnuna. Syrgt verður fyri at eiga mat inni, um onkur kemur á gátt, tí gestum kann ein altíð rokna við.

- Stevnurnar hava stóran týdning fyri tað sosiala í samfelagnum. Tær skapa nakað, og fólk rokna við teimum. Ólavsøkan fer altíð at vera tann størsta, og hon er eisini meira enn bara ein stevna. Tað hevði ongantíð borið til at flutt ólavsøkuna til Klaksvíkar, og tað er heldur ongin grund til tess. Í 1924, varð hon hildin somu dagar sum ólavsøkan varð hildin í havn. Tað gekk als ikki, tí fólk fóru heldur á ólavsøku í Havn enn vóru verðandi eftir í Suðuroy til ólavsøkuhaldið, ið varð hildið har tað árið.

Tá vit spyrja um norðoyastevnan framvegis verður á skránni um 10-20 ár, sigur ein avgjørdur fornminnaleiðari ja.

- Eg haldi bara, at tær størru stevnurnar fara at missa sín týdning við tíðini. Við bygdastevnunum verða tað alt ov nógvar stevnur, og tey somu fólkini kunnu ikki ganga til allar. Tað ber als ikki til.

- Tað sum hevur størstan týdning er at vera saman við øðrum til stevnurnar, og tað er tað sum dregur. Alt hitt er bonus. Sjálvandi fer man eisini til tiltøk, men lyklaorðið er at vera saman við øðrum, sigur Jógvan Ravnsfjall, leiðari á Norðoya Fornminnasavni at enda.